Sjúkrakassalimir!

Limir, ið fara til ella boðsenda lækna, mugu vísa fram gyldugt limaprógv um so er, at sjúkrakassin skal gjalda læknahjálpina og møguligt medisin. Limir, ið skylda út um 2 mánaðir fáa ikki hjálp frá sjúkrakassanum.

Er talan um telefonviðtalu, skal limanummar uppgevast. Verður limanummar uppgivið og viðkomandi er í eftirstøðu út um nevndu 2 mánaðar, heftir sjúkrakassin ikki fyri gjaldi av læknahjálp og medisini.

Læknahjálpin frá sjúkrakassanum er vanliga avmarkað til dagarbeiðistíðina hjá lækna og serligar reglur eru galdandi uttan fyri hesa tíð og eru tær hesar, samb. § 11, nr. 3 b:

Samsýning fyri læknahjálp, sum er umbiðin fyrstu fimm gerandisdagar millum kl. 16 og kl. 8 somuleiðis leygar-, sunnu- og heiligdagar, kemur ikki sjúkrakassanum við, men skal verða goldin av liminum sjálvum. Undantikin er tó læknahjálp í teim førum, tá limur knappliga verður sjúkur ella versnar tá vanlukka hendir ella í barnferð, *har viðgerð er bráðneyðug.*

Allir sjúkrakassalimir eru bundnir til tann lækna tey hava valt, ella um bert ein lækni er í læknadøminum, so til hansara. Einasta undantak frá hesum er smb. høvuðssamtyktina hetta:

Kassin rindar fyri sjúkrahjálp, sum limur hevur fingið aðrastaðni í Føroyum, um hann *brádliga verður sjúkur,* meðan hann fyribils er staddur uttan fyri kassans mark.

Er ikki talan um brádliga ákomna sjúku, so má viðkomandi sjálvur gjalda læknahjálpina.

Fyri læknahjálp sum sjúkrakassin skal gjalda, og sum er farin fram uttanfyri dagarbeiðistíðina ella um limur hevur verið hjá lækna uttanfyri læknadømi sítt, skal gjaldast eftiransingargjald, sum nú verður hækkað til 5 kr. fyri viðtalu og 10 kr. fyri at boðsenda lækna. Gjaldið krevur sjúkrakassin inn.

Frá 1. oktober 1978 hækkar limagjaldið fyri B-limir við 5 kr. um mánaðan í øllum sjúkrakøssum í landinum.

Vegna allar sjúkrakassar

MEGINFELAGIÐ

Bókakassar

Landsbókasavnið sigur frá, at bókakassar við 35—40 bókum í hvørjum — til vaksin og/ella børn — fáast ókeypis til láns frá Landsbókasavninum. Bygdir, har eingi bókasøvn eru, hava frammíhjárætt. Tann, ið hevur bókakassa undir hond, eigur at geva øðrum í bygdini høvi til at læna bøkurnar.

Tilfarið í barnabókakøssunum er nýtiligt sum ískoytislestur í fólkaskúlanum.

Bøn um bókakassa verður at senda Landsbókasavninum, postbox 61 í Havn, so skjótt sum til ber.

Børn og vaksin kunnu eisini læna beinleiðis hiðani. Vitjið inn, skrivið ella ringið!

Vit senda eisini bókalistar út á bygd, tá biðið verður um teir.

LANDSBÓKASAVNIÐ
box 61 — tlf. 11626
Opið: 09—12, 13—19, leygardag: 09—12

Vit ferma

hvønn mánadag og týsdag í Ålborg
hvønn mikudag í Halmstad
hvønn hósdag í København

2. hvørja viku í Larvik (næstu ferð 11/9»
3. hvørja viku í Ålesund (næstu ferð 14/9)
3. hvørja viku í Sandnes (næstu ferð 13/9)
4. hvørja viku í Blyth (næstu ferð 15/9)

til Føroyar

Frystikontainarar eins væl og vanligir kontainarar eru tøkir

AVGREIÐSLUR:

Chr. Jensen, tlf. 122566 Ålborg
A/s Traderline, tlf. 203311 København
Wilson & Co., tlf. 18135 Halmstad
Bugge & Olsen, tlf. 82090 Larvik
J. Hagenæs, tlf. 24078 Ålesund
T. Schancke Olsen, tlf. 66028 Sandnes
W. Harney & Co., tlf. 2331 Blyth

BOX 17 TLF. 13960 TELEX 81236 TRADER TÓRSHAVN

PARTAFELAGIÐ STAR SHIPPING

Vit ferma til Føroyar

hvønn hósdag í Keypmannahavn
hvønn fríggjadag í Ålborg

í Drammen aðruhvørja viku (næstu ferð 11/9)
í Halmstad aðruhvørja viku (næstu ferð 14/9)
í Ålesund triðju hvørja viku (næstu ferð 9/9)
í Sandnes triðju hvørja viku (næstu ferð 15/9)

Vanligir kontainarar og frystikontainarar eru tøkir

AVGREIÐSLUR:

København:
DFDS A/S
Sankt Annæ Plads 30
1295 København K
Telefon: 01)156300 Telex: 19435
Góðsavgreiðsla: Sluseholmen

Ålborg:
E. A. Bendix & Co. A/S
Nyhavnsgade 9 (box 651)
9100 Aalborg
Telefon: 08)138300 Telex: 69643

Esbjerg:
DFDS ekspedition
Englandskajen
6700 Esbjerg
Telefon: 05121700 Telex 54151

Halmstad:
AB Th. Schéle
Bredgatan 2 (box 92)
30102 Halmstad
Telefon: 035)100440 Telex: 38100

Drammen:
Seeberg & Nielsen Ltd. A/S
P.O.Box 667
3001 Drammen
Telefon: 02)818180 Telex: 18772

Ålesund:
Mørerutene A/S
6001 Ålesund
Telefon: 23313 Telex: 42738

Sandnes:
T. Schanche Olsen
Telefon: 66028

Trondheim:
B. S. Shipping Co.
Havnegaden 9
Telefon: 20088

Partafelagið STAR SHIPPING

brúkarateigurin

Merkingin av íslendskum seyðakjøti

Um stutta tíð verður vónandi aftur gott og biligt íslendskt seyðakjøt at fáa. Hóast føroyska kjøtið í flestu førum so avgjørt er betri til turkingar, so er tað íslendska fult so gott og stundum stundum kanska betri til at steikja og kóka feskt. Prísmunurin hevur eisini verið rættiliga stórur og avgerandi í vanliga húsarhaldinum.

Hóast føroyska seyðakjøtið meira er at rokna sum ein luxusvøra í dag heldur enn vanligur døgurðamatur, so letur ikki til at tað verður framleitt nóg mikið av tí til heimamarknaðin. Nakað annað er, at sølan er rættiliga ófyriskipað og kjøtið er hvørki flokkað ella merkt á nakran hátt sum t.d. íslendska kjøtið og annars kjøtvørur úr flest øllum øðrum londum. Í Føroyum vantar framvegis ein matvørulóggáva, sum BF fyrr hevur víst á.

BF hevur fingið fyrispurning frá fólki um, hvat teir ymsu stavirnir og merkini á íslendsku seyðakroppunum hava at týða. Vit skulu tí nýta høvi til her at endurgeva merkingarnar eftir teimum upplýsingum vit hava fingið frá samskipaða íslendska framleiðslu- og sølufelagsskapinum SÍS:

Uppi í hvørjum krovi hongur ein merkisseðil. Á aðrari síðuni skal standa ein váttan frá íslendsku heilsumyndugleikum. Á hinari síðuni stendur SAMBAND. PRIME ICELAND LAMB — sum er óneyðugt at týða. Síðani nakrir stavir t.d. KHB, sum standa fyri navni sláturvirkisins. Tey sum vanliga síggjast á kjøti, sum kemur hendan vegin eru:

KHB = Kaupfélag Héraðsbúa, Egilsstøðum, KVV = Kaupfélag Vopnfirðinga, Vopnafirði, KASK = Kaupfélag Austur-Skaftfellinga, Höfn, KL = Kaupfélag Langnesinga, Þórshöfn.

Undir hesum stavum stendur so eitt tal:

6 merkir at kjøtið er fyrsta flokks og vigar upp til 12,5 kg.

2 merkir at kjøtið er fyrsta flokks og vigar 13 til 16 kg.

8 merkir at kjøtið er fyrsta flokks og vigar 16,5 til 19 kg.

4 merkir at kjøtið er fyrsta flokks og vigar 19,5 til 22,5 kg.

Stendur eitt × aftur at nummarinum, merkir tað »annar flokkur«, ×× merkir »triði flokkur«.

Brúkarafelagið



Tlf. 11820—14720